Bæði fyrimunir og vansar við politiskt óbundnum blaði

Politiskan stuðul fáa vit ikki, men á hin bógvin stendur eitt tílíkt blað ikki heft av nøkrum, sigur blaðstjórin á Norðlýsinum, Oliver Joensen

Norðlýsið, lokalblað fyri Klaksvík og Norðuroyggjar, kemur út hvønn friggjadag í umleið 1700 eintøkum. Meginparturin verður seldur í Klaksvík og har um vegir, men nakað verður eisini selt aðrastaðir í Føroyum. Hetta er ikki so løgið, tí við tí tilfari og lýsingum, sum blaðið hevur, verður størsti dentur lagdur á at viðgera tað, sum hendir her norðuri, sigur Oliver.


NORÐLÝSIÐ 1977

Loddrættar lygnir verða slongdar tingmonnum, tá teir koma við fyrispurningum

Noyddir inn í New Foundlandi

Vektarskip og helikopterar stongdu Bordoyarnesi at fiska. Hann bíður nú eftir orum loyvi.

Fyrsta føroyska gullnálin?

— So leingi vit ikki lønar fólki at skriva blaðið, umframt smærri samsýningar, og vit bert hava tvey fólk til tað tekniska, standa vit okkum fíggjarliga, men tað er okkara vón, at vit fáa skapt so mikið gott fíggjarligt grundarlag undir blaðnum, at vit eisini kunnu løna fólki at skriva, sigur Oliver.


Frá umbrótingarrúminum á Norðlýsinum

Ikki regluliga

Norðlýsið kom út á fyrsta sinni í 1915, og var tað Símun Petur Zachariasen, sum stovnsetti tað. Blaðið kom út í nøkur ár, men góvust teir so. Eftir hetta er blaðið komið út undir skiftandi blaðstjórnum, og ikki er tað altíð komið regluliga. Núverandi blaðstjórnin er Oliver Joensen, blaðstjóri, Eigil Hentze, Símun Michael Poulsen og Óli Heinesen. Teir byrjaðu í 1974 og høvdu tá blaðið gangandi í eitt ár. Síðani fingu teir so blaðið út aftur 1. oktober í fjør, og er tað komið út regluliga í 12 og 16 síðum hvønn friggjadag. At tað hevur gingið so gott, sum tað hevur, hava vit nógv at takka okkara trúgvu lýsarum, serliga her norðuri,

Nýggja útgerð

Øll tilgerðin av Norðlýsinum verður nú gjørd í Klaksvík, burtursæð frá sjálvari prentingini, sum er á Dimmalætting. Teir útvegaðu sær nýmótans útgerð, og eru umstøðurnar tí av teim bestu.

Uppá fyrispurning um hvat framtíðarynski blaðstjórin hevur sigur hann, at best var, um teir høvdu sína egnu pressu, men hetta ynski liggur nakað langt frammi í tíðini. Harafturímóti er okkara ynski at fáa skapt nóg mikið gott fíggjarligt grundarlag undir blaðnum, at tað kann løna fólki at skriva, tí eitt tílíkt lokalblað hevur sín avgjørda rætt, soleiðis at eisini vit frá útjaðaranum í Føroyum fáa gjørt vart við okkum, endar Oliver Joensen.

Óli í Áarstovu



Pauli Ellefsen skrivar í Dimmu, at tann officielli Javnaðarflokkurin er triggir menn: Atli, Vilhelm og ein triði. Hann vildi ikki nevna, at eg eri tann triði, tí so kundi tað hent seg, at fólk fór at taka tað sum skemt.

— * —

Blaðmannafelagið, sum hevði 25 ára stovningarveitslu í síðstu viku, fekk eina dupultsong í føðingardagsgávu, og var hon ætlað til framhaldandi svøvnin.


Hetta verður helst av ongum, tí Herman og Niels Juul kunnu sum kunnugt ikki einast undir somu dýnu, sjálvt um Sigmund er semingsmaður.

— * —

Dimmalætting skrivaði herfyri, at russisk skip altíð koma á Havnina, tá týdningarmiklar avgerðir skulu takast.


Í síðstu viku var eitt russiskt skip á Havnini í samband við ársaðalfundin hjá Blaðmannafelagnum. Teir ætlaðu at fáa myndir av Chr. N. Chr., Andreas E. Joensen til arkivið í Kreml.

hornið



Trøini mugu víkja, so bilarnir skjótari kunnu sleppa úr einum enda av býnum í hin...

BLAÐTALVIÐ



Hvítur Andrias Ziska — Svartur Luitjen Apol

9. — fd8—c7

VEÐRIÐ

Sunnan ella landsynningur megi 3—5, samdrigið og támut veður, stundum smáregn og mjørki.

Einaferð fyrrapartin í morgin megi 2 til 4 av suðri ella útsynningi. Skýggjað og okkurt ælið. Hitin alt samdøgrið millum 9 og 13 stig.